FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Reglugerð um farloyvi til lesandi

Við heimild í grein 13, stk. 1 í kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, verður her lýst reglugerð í samband við farloyvi til lesandi.

## 1. Endamál

Endamálið við reglugerðini er at tryggja, at allar umsóknir um farloyvi verða viðgjørdar eftir sama leisti og reglum.

Lesandi, ið eru innskrivað til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um farloyvi frá lestrinum í styttri ella longri tíðarskeið.

Treyt fyri at fáa farloyvi frá lestrinum er, at tað er møguligt hjá tí lesandi at taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi. Tað vil siga, at tað er møguligt hjá tí lesandi at taka lesturin upp aftur, har viðkomandi slepti ella at fylgja einari tillagaðari lestrarætlan, ið er góðkend av avvarðandi útbúgvingarleiðara.

## 2. Farloyvi

Lesandi kunnu søkja um ógrundað ella grundað farloyvi.

### 2.1. Ógrundað farloyvi

Lesandi, ið eru innskrivaði til fulltíðarlestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um farloyvi frá lestrinum í upp til 12 mánaðir samanlagt fyri hvørja útbúgving. Til útbúgvingar har upptøka ikki er á hvørjum ári, kann útbúgvingarleiðarin í undantaksføri geva farloyvi, ið eru longri enn 12 mánaðir, um tað er neyðugt fyri at kunna leggja eina lestrarætlan til rættis fyri tann lesandi. Treyt fyri at fáa ógrundað farloyvið er, at tann lesandi hevur staðið 60 ECTS á bachelor-stigi ella 30 ECTS á master-stigi á útbúgvingini, ið tey lesandi eru innskrivað til.

### 2.2. Grundað farloyvi

Lesandi kunnu søkja um grundað farloyvi, tá fylgjandi umstøður/viðurskifti gera seg galdandi:

| | |
|---|---|
| Sjúka ella diagnosa hjá tí lesandi | Talan er um sjúku ella diagnosu hjá tí lesandi, sum hevur við sær, at tann lesandi í styttri ella longri tíðarskeið ikki er før/ur fyri at vera virkin lesandi.<br>Læknaváttan skal leggjast við umsóknini, har upplýst verður, hvussu leingi sjúkan verður mett at vara. |
| Barnsburður og ættleiðing | Lesandi, ið gerast foreldur, kunnu fáa barnsburðarfarloyvi í upp til 12 mánaðir.<br>Avrit av váttan um, nær mettur føðidag er ella ættleiðingarskjøl skulu viðleggjast umsóknini. |
| Aðrar serstakar umstøður | Talan er um viðurskifti, sum gera, at tann lesandi ikki kann vera virkin lesandi. Talan kann t.d. vera um álvarsliga sjúku ella deyðsfall í nærmastu familju og onnur persónlig viðurskifti sum t.d. |

| | |
|---|---|
| | hjúnaskilnaður.<br>Støðan skal lýsast og leggjast við umsóknini. |

### 2.3. Longd á farloyvistíðarskeiði

Av tí at útbúgvingarnar á Setrinum hava ymsan bygnað, so er ymiskt, hvussu leingi skilabest er hjá einum lesandi at vera í farloyvi. Hvussu langt tann lesandi er komin á útbúgvingini, kann eisini hava ávirkan á, hvussu langt farloyvistíðarskeið søkjast kann um. Nærri kunning og reglur hesum viðvíkjandi eru at finna í námsskipanini fyri útbúgvingina.
Lesandi skulu tó vera liðug at lesa í seinasta lagi 3 ár eftir ásetta lestrartíð, og tá er farloyvids-tíðarskeið/ini íroknað. Sí nærri ásetingar í *Reglugerð um lestrarvirkni á Fróðskaparsetri Føroya*.

## 3. Avleiðingar av at fara í farloyvi

Fróðskaparsetur Føroya kann ikki geva lyfti um, at tann lesandi uttan trupulleikar kann taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi. Tað er ábyrgdin hjá tí lesandi at kunna seg um, hvørjar møguligar avleiðingar eitt farloyvi hevur fyri lesturin hjá viðkomandi. Hetta verður gjørt í samráð við avvarðandi útbúgvingarleiðara og lestrarvegleiðara.

Í farloyvistíðarskeiðinum hevur tann lesandi ikki rætt til at fylgja undirvísingini, fara til prógtøkur, lata inn uppgávur ella fáa vegleiðing. Tann lesandi kann heldur ikki vera virkin í lestrarráðum í hesum tíðarskeiði.
Undantak frá hesi meginreglu kann tó gerast, tá tað er ein fortreyt fyri, at tann lesandi kann taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi, at viðkomandi fylgir einum avmarkanum parti av undirvísingini, fer til próvtøku ella letur inn uppgávu.

Lesandi, ið eru í farloyvi frá einari útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu ikki fara undir aðra útbúgving á Fróðskaparsetrinum í farloyvistíðarskeiðinum. Ger ein lesandi hetta, verður tað roknað sum útskriving frá útbúgvingini, ið viðkomandi er í farloyvi frá.

## 4. At søkja um farloyvi

Umhugsar ein lesandi at taka farloyvi frá lestrinum, skal viðkomandi seta seg í samband við sín útbúgvingarleiðara ella lestrarvegleiðaran á deildini. Tann lesandi og útbúgvingarleiðarin ella lestrarvegleiðarin kanna síðani, hvørjar møguligar avleiðingar farloyvið fær fyri restina av lestrartíðini hjá tí lesandi, og funnið verður fram til, hvussu tann lesandi á bestan hátt kann taka upp aftur lestur eftir endað farloyvi. Tá hetta er greitt, útflýggjar útbúgvingarleiðarin ella lestrarvegleiðarin tí lesandi umsóknarblað at útfylla.

### 4.1. Viðgerð og avgreiðsla

Umsøkjarin letur umsóknina við møguligum fylgiskjølum til avgreiðslu á deildarskrivstovuni. Deildarskrivstovan váttar móttøku og skrásetir mál í journal. Síðani verður umsóknin send avvarðandi útbúgvingarleiðara til viðgerð. Tá niðurstøða fyriliggur, sendir útbúgvingarleiðarin niðurstøðuna til tann

lesandi og deildarskrivstovna. Deildarskrivstovan skrásetir niðurstøðuna í journal og sendir próvbókini boð um skráseting av farloyvi, um farloyvisumsóknini verður gingin á møti. Fær tann lesandi tillagaða lestrarætlan í samband við farloyvið, verður lestrarætlanin eisini send próvbókini at skráseta.

Verður umsóknini ikki gingin á møti, verður niðurstøðan einans skrásett í journal. Í tílíkum førum skal tann lesandi í niðurstøðuni fáa grundgeving fyri avgerðini og kunning um kærumøguleika. Kærumyndugleiki er Mentamálaráðið.

### 4.1.1 Studni

Lesandi hava sjálvi ábyrgd av at avgreiða stuðulsviðurskiftini við Studna í samband við farloyvi, tá talan er um barnsburðarfarloyvi. Oyðubløð eru at finna á heimasíðuni hjá Studna. Deildarskrivstovan váttar vegna Setrið á umsóknarblaðið hjá tí lesandi.

Er talan um annað slag av farloyvi, boðar deildarskrivstovan Studna frá hesum í telduposti til studni@studni.fo, samstundis sum boð verða send próvbókini um skráseting.

### 4.1.2. Endað farloyvi

Deildarskrivstovan hevur yvirlit yvir, hvørji lesandi eru í farloyvi, og nær farloyvini enda.

Tá lesandi fáa játtað farloyvi, fáa tey samstundis upplýst, nær tey í seinasta lagi skulu boða frá, at tey taka upp aftur lesturin sum ætlað eftir endað farloyvi, og tað er ábyrgdin hjá tí lesandi at boða frá til ásettu freist. Deildarskrivstovan útvegar tí lesandi skjalið "*Váttan um endurinnskriving*", sum tann lesandi skal útfylla og senda aftur.

Boðar tann lesandi ikki rættstundis frá, so setir útbúgvingarleiðarin ella lestrarvegleiðarin seg í samband við viðkomandi. Hevur tann lesandi ikki boðað frá, tá lesturin eftir ætlan skal takast upp aftur, sendir deildarskrivstovan Lestrarskrivstovuni boð um hetta, og sendir Lestrarskrivstovan tá tí lesandi ætlanarskriv um útskriving.

Lesandi, ið ikki kunnu taka upp aftur lesturin, sum ætlað, kunnu søkja um at fáa farloyvið longt, um serstøk viðurskifti tala fyri hesum. Tá verður søkt um farloyvi av nýggjum og mannagongdin í punkti 4 verður nýtt.

Lesandi, ið byrja aftur eftir endað barnsburðarfarloyvi, skulu sjálvi boða Studna frá hesum. Oyðublað er at finna á heimasíðuni hjá Studna. Deildarskrivstovan váttar vegna Setrið á umsóknarblaðið hjá tí lesandi.

Er talan um annað slag av farloyvi, boðar deildarskrivstovan Studna frá hesum í telduposti til studni@studni.fo, samstundis sum boð verða send próvbókini um skráseting.